## Noreg kjarnorku

Norski fíggjarmaðurin Jens Ulltveit-Moe heldur, at norðmenn eiga at byggja nøkur kjarnorkuverk afturat verandi vatnorkuverkum. Jens Ulltveit-Moe skrivar í einari blaðgrein, at Finnland leggur størsta dentin á kjarnorku, og at sviar fara at varðveita síni kjarnorkuverk í mong ár afturat. Harafturat hevur Bretland gjørt av at útbyggja sína kjarnorku munandi. Noreg heldur seg til vatnorkuna, men vit mugu hugsa nýtt, skrivar Ulltveit-Moe.

## Smíða flogfør sjálvir

Kinesiski flogídnaðurin ætlar sær nú at taka kappingina upp við flogídnaðin í Evropa og USA. Sambært BBC hevur kinesiska leiðslan lagt ætlanir um at menna nýggj flogfør, sum skulu taka meiri enn 150 ferðafólk. Marknaðurin er í hvussu er ovurstórur, tí mett verður, at Kina skal hava meiri enn 2.200 flogfør tey næstu seytjan árini. Sum er smíða kinesarar flogførini ARJ-21, sum kunnu taka millum 78 og 105 ferðafólk.

# rskot í 2007



*Hóast ongar oljuinntøkur higartil var gott lag á nevndarlimum og stóra í Atlantic Petroleum eftir aðalfundin leygardagin. Á aðalfundinum varð millum annað samtykt at hækka nevndarsamsýningina við 333 prosentum – úr 300.000 upp í 1. mió. krónur árliga. Frá vinstru: Óli Hammer, Mortan Johannesen, Poul Mohr, Kjartan Hoydal (fm.), Wilhelm Petersen (stjóri), og Petur Even Djurhuus.*

*Mynd: Hilmar Simonsen*

eum í framtíðini keypir okkurt annað minni oljufelag upp. Wilhelm Petersen dylir ikki fyri, at hesin møguleikin hevur verið viðgjørdur, og kemst hetta millum annað av, at Atlantic Petroleum er eitt væl kapitaliserað felag í løtuni, og hevur góðar møguleikar at útvega sær meiri fígging við lántøku. Tað finnast fleiri smærri oljufeløg, sum ikki hava somu møguleikar í so máta.

- At keypa upp er ein møguleiki, vit kveita til, men vit hava onga ítøkiliga ætlan á borðinum, slær Wilhelm Petersen fast.

Fyri at fíggja útbyggingina av Ettrick-leiðini, umframt at styrkja felagið, útskrivaði Atlantic Petroleum partabrøv á keypsskálanum heilar tvær reisur í 2006. Hetta gav felagnum eina kapitalhækking á 212 mió. krónur. Hesin partapeningur varð teknaður til kurs 550 og gav hetta tí eina áljóðandi hækking í partapeningi á slakar 38,6 mió. krónur, so at samlaði partapeningurin nú er 112,6 mió. krónur.

Wilhelm Petersen sigur, at felagið í løtuni ikki hevur ætlanir um at hækka partapeningin meiri, men um ein slík ætlan sum at keypa eitt annað oljufelag gerst veruleiki, so kann ein partabrævahækking koma upp á tal kortini.

Tann peningur, sum felagið hevur at ráða yvir, er ikki bundin í lánsbrøv ella aðrar langtíðaríløgur, og hetta kemst av, at felagið hevur brúk fyri peninginum í samband við útbygging av Ettrick leiðini og víðari menning av Chestnut leiðini.

Tá nú fyrst Chestnut, og síðani Ettrick, í næstu framtíð fara at framleiða, so fær felagið ein peningastreym, ið skal vera grundarlag fyri at fáa enn meiri fígging at brúka til nýggjar íløgur.

- Tá vit koma til framleiðslu skal felagið hava ein annan kapitalstruktur, sum er ein kombination av eginkapitali og fremmandafígging. Tá felagið hevur egna inntøku, so er tað ikki nóg effektivt bara at hava eginkapital. Hetta gevur okkum so møguleika at uppkeypa onnur og størri aktiv, enn vit áður hava gjørt, sigur Wilhelm Petersen.

> *Vit hava potentiali til at vaksa nógv størri, og tað er kapitalgrundarlagnum fyri at takka*
>
> *Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum*

# Stutt lýsing av Atlantic Petroleum

**OLJUVINNA**

*Hilmar Simonsen*

Atlantic Petroleum er eitt privat oljufelag við ognarpørtum í olju- og gassloyvum í Norðsjónum, í írska havinum og í føroyskum sjógvi. Atlantic Petroelum er skrásett á keypsskálunum OMX í Íslandi og á OMX í Keypmannahavn. Sagt verður, at fremsta málið er at vaksa um virðini hjá partaeigarunum við at taka lut í leiting, útbygging og framleiðslu av olju og gassi í útnyrðingsevropa.

Høvuðsvirksemið hjá felagnum er at leita eftir og framleiða olju og gass. Felagið virkar við dótturfeløgum í ávikavist Onglandi og í Írlandi og við luttøku í samtøkum.

**Varðar**

| | |
|---|---|
| 1998 | Felagið varð stovnað |
| 1999 | Samstarvssavtala gjørd við The Faroes Partnership (Amerada Hess, Dong, British Gas |
| 2000 | Fekk tillutað føroyska loyvið 001 |
| 2001 | Fekk lut í tveimum leitiloyvum vestanfyri Hetland |
| 2003 | Keypti ognarpartar í oljuleiðunum Chestnut, Ettrick og Perth í enskum øki |
| 2004 | Stór kapitalhækkeking undan skrásetingini á OMX í Íslandi |
| 2005 | Fekk tillutað føroysku loyvini 013 og 014 |
| 2005 | Skrásett á keypsskálanum OMX í Íslandi |
| 2005 | Fekk lut í oljuleiðini West Lennox í enskum øki |
| 2005 | Útbyggingarætlanin fyri Chestnutleiðina góðkend |
| 2005 | Fekk lut í føroyska leitiloyvið 006 |
| 2006 | Atlantic Petroleum á ICEX 15 listan |
| 2006 | FPSO (Floating Production, Storage and Offloading) leigaður til Chestnutleiðina í eitt hálvtriðja ára tíðarskeið |
| 2006 | Útbyggingarætlanin fyri Ettrickleiðina góðkend |
| 2006 | FPSO leigaður til Ettrickleiðina í eitt fimm ára tíðarskeið |
| 2006 | Dupultskráseting á OMX í Keypmannahavn |
| 2006 | Útlendskir stovnsligir íleggjarar seta pening í Atlantic Petroleum |
| 2006 | Brunnur boraður í leitingarmiðinum Brugduni |
| 2007 | Virksemið víðkað inn í írskt øki, og felagið fingið lut í fundum og leitingarloyvum í Írlandi |

**Nevnd**

Kjartan Hoydal (formaður)
Poul R. Mohr
Mortan H. Johannesen
Petur Even Djurhuus
Óli A. M. Hammer

**Leiðsla**

Wilhelm E. Petersen, stjóri
Teitur Samuelsen, fíggjarleiðari

**Yvirlit yvir ognarpartar í loyvum**

| *Land* | *Leið* | *Atstøðufelag* | |
|---|---|---|---|
| *Ognarpartur* | | | |
| St. Bretland | Chestnut | Venture Production Plc. | 15 % |
| - | Ettrick | Nexen | 8,27 % |
| - | Perth | Nexen | 3,75 % |
| - | West Lennox | Challenger Minerals | 25 % |
| - | Crosby | Challenger Minerals | 20 % |
| Írland | Helvick | Providence Resources | 10 % |
| - | Ardmore | Providence Resources | 10 % |
| - | Dunmore | Providence Resources | 10 % |
| - | Hook Head | Providence Resources | 10 % |
| Føroyar | Stella Kristina | Geysir Petroleum | 40 % |
| - | Marselius | Geysir Petroleum | 40 % |
| - | Brugdan | Statoil | 0,025 % |

(Kelda: Atlantic Petroleum ársfrágreiðing fyri 2006)